e-mail: jakup@sosialurin.fo
Ítróttur
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Fingu neyðugu stigini

Neistin vann sær bæði stigini móti H71 mikukvøldið, og eru teir nú ájavnir vestmenningum, men tað er púra vist, at teir skulu finna annað spæl fram komandi vikurnar, um gullvónirnar skulu varveitast

Tað eydnaðist Karl Oddmari og teimum úr Neistanum at vinna sær vinna sær tvey stig móti H71, men leingi góvu hoyvíkingarnir harða mótstóðu

Mynd: Álvur Haraldsen

JÁKUP MØRK

Neistin-H71 29-23 (14-14)

Gjøgnum alt kappingarárið, og serliga seinastu vikurnar, hevur stórur munur verið á, hvussu hevur hylnast hjá teimum báðum liðunum, sum mikukvøldið skuldu royna seg í Ítróttarhøllini á Hálsi.

H71 hevur alt kappingarárið talst millum niðara liðini á stigatalvuni, meðan Neistin hinvegin hevur verið í toppinum, og meðan Neistin higartil hevur vunnið allar sínar dystir í endaspælinum, hava hoyvíkingar fingið lemjandi kritikk fyri síni avrik seinasta mánaðin ella so.

Tískil var kanska væntandi, at Neistin fór at vinna ein stórsigur, og á tann hátt betra eitt sindur um málmunin, sum kann fáa avgerandi týdning í seinasta enda.

H71 gavst ikki

At byrja við var eisini líkt til, at júst ein stórsigur var tað, sum neistaleikararnir høvdu í huga. Eftir fáum minuttum var støðan longu 5-1, og so hildu fáu áskoðararnir í høllini, at hesin dysturin var avgjørdur.

Neistaleikararnir hildu helst tað sama, men trupulleikin var bara tann, at teir høvdu gloymt at spurt hoyvíkingar eftir. Hoyvíkingar, uttan skadda Olaf Vestergaard, men stryrktir við fysiskt sterka Allan Mørkøre og kvika Jákup á Borg, fóru nú spakuliga í holt við at taka leiðsluna aftur.

Um hálvan hálvleikin høvdu teir vunnið seg fram um Neistan, og síðani gekk javnt á, tað næsta korterið. Liðini bæði skiftust um at hava leiðsluna, og javnleikur mundi tí vera ein hóskandi hálvleiksstøða.

Sama søgan

Seinna umfarið byrjaði eins og fyrra, og tá einir tíggju minuttir vóru farnir av hálvleikinum, var Neistin framan fyri við einum fimm málum. Hoyvíkingar, sum í fleiri dystum hava tykist at orka ov lítið eftir steðgin, megnaðu tó enn eina ferð at skapa nakað av spenningi í dystin.

Hesu ferð gjørdust teir tó ov stuttir, men komst serliga av, at Petur Magnusson nú framdi fleiri bjargingar, og so at Áki Olsen rættuliga tók dik á seg. Stórskjúttin úr Vestmanna fekk mál burtur úr so at siga øllum, og var kanska meira enn nakar annar maðurin, sum tryggjaði Neistanum stigini hetta kvøldið, hóast áhaldni hjá Kára Mortensen ikki er at forsmáa.

Hin stórskjúttin á Neistaliðnum, Heini Joensen, hevði als ikki nakran góðan dag mikukvøldið. Skotroyndirnar vóru tó eins nógvar, og tær vanliga eru, men antin var neyvleikin ikki nóg góður, ella varð royndin møtt av hoyvíksverjuni.

Nærri enn tveimum málum komu hoyvíkingarnir so ikki í seinna hálvleiki, og móti endanum, tá alt var mest sum avgjørt, kundi Neistin so fáa nøkur løtt mál afturat.

Kanska í framtíðini

Sjálvsagt var frøi á neistaleikarunum, nú teir aftur eru ájavnir vestmenningum í stigum, men hugburðurin til uppgávuna skal í øllum førum broytast, um teir ætla at gera sær nakrar vónir um gullmerkini.

Hetta munnu leikararnir tó eisini vera fullgreiðir yvir, og einki er at ivast í, at teir fara geva seg nakað væl meira, tá mótstøðuliðið eitur StÍF ella VÍF.

Hoyvíkingar hava seinastu tíðina leikt nakrar dystir, sum hava verið alt annað enn góðir og spennandi. Mikukvøldið var tó vend komin í, tí hóast teir ikki megnaðu at gera Neistanum nakað, so var aftur vilji at síggja í spæli teirra.

Eisini var tað ein góður styrkur, at bæði Allan Mørkøre og Jákup á Borg nú eru aftur á liðnum. Allan er kanska ikki ein eins góður teknikari sum Jákup, men kropsliga styrki hansara er øgilig, og tá hann nýtir hesa á rætta hátt, er hann ein fongur, bæði í verju og álopi.

Liðið telur eisini fleiri aðrar spennandi ungar leikarar, so hóast teir enn ikki hava fingið tað stóra burtur úr hesum kappingarárinum, so kann væl verða, at meira fer at spyrjast burtur úr komandi árini. Ikki minst, tá havt verður í huga, at venjingarumstøðurnar verða bøttar munandi komandi vetur, tá nýggja ítróttahøllin í Hoyvík væntandistendur liðug.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Neistin: Áki Olsen 9, Kári Mortensen 7, Heini Joensen 4 (1), Karl O. Rasmussen 3, Finnur Hansson 3, Jákup Sverri Kass 2, Elmar Ósá 1
H71: Allan Mørkøre 6 (1), Eyðun H. Højgaard 6, Halgir Dahl Olesen 5, Jákup á Borg 4, Bárður Brimvík 2
Brotskøst:
H71 4, Neistin 2
Útvísingar:
H71 4, Neistin 3
Dómarar úr Kyndli:
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

Støðan, 1. deild menn

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VÍF	9	7 - 0 - 2	610	472	138	25
2 Neistin	8	8 - 0 - 0	587	496	91	25
3 StÍF	8	6 - 0 - 2	582	493	89	23
4 Kyndil	8	5 - 0 - 3	562	489	73	17
5 KÍF	9	3 - 0 - 6	468	595	-127	7
6 H71	9	1 - 0 - 8	487	597	-110	4
7 Tjaldur	9	0 - 0 - 9	504	658	-154	3

Stórsigur

Eingin ivi var um úrslitið, tá Tjaldur og StÍF mikukvøldið gjørdu útsetta dystin av sær. StÍF vann greiðan sigur, og heldur framhaldandi fast um FM-vónina

JÁKUP MØRK

Tjaldur-StÍF 21-34 (10-14)

Eftir at dysturin millum liðini bæði varð avbrotin fyri viku síðani, skuldu Tjaldur og StÍF enn einaferð hittast mikukvøldið.

Tjaldursmenninir høvdu kanska vóna, at tað skuldi bera til at fáa eitt líkinda úrslit burtur úr dystinum, tí tá undanfarni dysturin varð steðgaður, hevði gingið hampuliga javnt á, hóast dysturin kanska hevði verið heldur rokmikil.

Eingin ivi

Dysturin mikukvøldið byrjaði eisini hampuliga javnt, men eftir at Tjaldrið hevði javnað til 4-4 gekk bara ein veg, og hetta var til fyrimuns fyri føroymeistararnir av Strondum.

Teir settu snøgt sagt ferðina eitt sindur upp, og síðani vóru teir á heimaliðnum ongantíð nær námind sensatiónini.

Í hálvleikssteðginum var munurin tó ikki hin stóri, men í seinna hálvleiki øktu strandingar støðugt um munin, soleiðis at stóri sigurin kundi tryggjast.

Dupultan leiklut

Tað skal tó leggjast afturat, at Tjaldrið viknaði munandi í seinna hálvleiki. Fyrst fekk Ragnar Olsen reyða kortið fyri at toga Artur í armin, tá hesin hevði beina kós móti málinum, og móti endanum av seinna hálvleiki fekk Tummas Magnussen eisini ostaskorpuna at síggja fyri sama brot móti sama leikara.

Tá so Súni Fríði eisini noyddist av vøllinum, vóru góð ráð dýr, tí nú vóru einans fimm útileikarar eftir á liðnum. Ráðini vóru tí, at Jørgin Gudmundson varð tikin úr málinum og latin í nýggja troyggju, soleiðis at hann á dómaraseðlinum varð skrásettur tvær ferðir. Jørgin megnaði eisin at fáa eitt mál móti endanum av dystinum, og avloysari hansara, Sjúrður Jacobsen stóð seg bara heilt væl í málinum.

Hanga í

Við sigrinum mikukvøldið helt StÍF fast um vónina um at endurvinna meistaraheitið, og eftir dystin var venjarin, Jónleif Sólsker, eisini vel hýrdur. Serliga lat hann væl at skjóta spælinum, sum lið hansara hevði sýnt.

Tað verður helst eisini neyðugt hjá StÍF at vísa seg frá sínari bestu síðu komandi vikurnar, tí eftir at teir sunnudagin skulu royna seg móti H71, standa tríggir sera torførir heimadystir á skránni. Neistin, VÍF og Kyndil koma á vitjan í nevndu raðfylgju, og ivaleyst kann hetta samanberast við at leika tríggjar steypafinalur á rað, tí StÍF hevur valla ráð til at tapa nakran av hesum dystum.

Tað høvdu teir forrestin heldur ikki seinasta ár um sama mundi…

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Tjaldur: Sverri Justinussen 8 (4), Arngrímur Arngrímsson 4, Tummas Magnussen 3, Súni Fríði Johannesen 2, Arnfinn Langgaard 1, Áki L. Hansen 1, Svenn Olsen 1, Jørgin Gudmundson 1
StÍF: Artur Johansen 9 (2), Jónleif Sólsker 6, John Petersen 5 (3), Sveinbjørn Poulsen 5, Pauli Hansen 3, Leivur Justinussen 2, Marius Joensen 2, Alexandur Johansen 1, Poli Hansen 1
Brotskøst:
Tjaldur 4, StÍF 5
Útvísingar:
Tjaldur 1, StÍF 3
Diskvalifikatiónir:
Tjaldur 2 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Neistanum:
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen

Nú fer Jákup at stríðast fyri DM

Superligan: *Todi Jónsson er samdur við danska landsliðsvenjaranum, sum heldur, at Herfølge hevur góðar møguleikar at vinna danska meistaraskapin*

Jákup Mikkelsen og teir í Herfølge skulu nú royna at varðveita fyrsta plássið, sum teir í løtuni eru á

Sunnudagin verður farið undir aftur fótbóltslandskappingina í Danmark. 28. mai verður síðsta umferð spælt, og tá verður greitt, um ein føroyingur fyri fyrstu ferð nakrantíð fer at vera við til at vinna ein fótbóltsmeistaraskap uttanlands.

Átjan umfør vórðu fingin frá hondini undan vetrarsteðginum, og nú sjøtul verður settur á fimtan tey síðstu umførini, liggur Herfølge á odda. Teir eru seks stig undan Brøndby, og hesa síðstu vikuna hava nógvir í Danmark, sum mettir verða at hava skil fyri fótbólti, givið til kennar, hvat teir halda um møguleikarnar hjá Herfølge at varðveita oddastøðuna og harvið fyri fyrstu ferð at vinna meistaraskapin.

Ikki so sjáldan hevur sjónarmiðið verið, at Brøndby, sum hevur fingið nýggjan norskan venjara, og sum hevur styrkt seg við fýra norskum og svenskum landsliðsspælarum, fer at enda ovast. Men tað eru tey,ið halda, at Herfølge var so sannførandi í heyst, at tað er eingin orsøk ikki at rokna við, at teir fara at halda tørn.

Bo roknar við Herfølge

Millum hesi seinast nevndu er venjarin hjá danska landsliðnum, Bo Johansson. Fyrr í vikuni segði hann stutt og greitt, at Herfølge eigur besta fótbóltsliðið í Danmark. Hann rósti John Faxe Jensen fyri at hava fingið so stóra úrtøku burturúr manningini, og hann helt, at spælistílurin líktist ikki so lítið honum hjá danska landsliðnum.

– Í nógvum donskum feløgum hyggja tey við undran at norska Rosenborg. Hesi eiga eisini at hyggja at Herfølge, tí spælistílurin er rættuliga líkur. Ein spælir fyri allar og allir fyri ein. Herfølge var miðvíst í álopspartinum, har teir í heyst vístu frágera gott vongspæl, og tað fer at bera teir langt, er skoðsmáið, sum felagið hjá Jákupi Mikkelsen fær frá danska landsliðsvenjaranum.

Todi er ikki ósamdur

Um Herfølge vinnur DM, so fara teir at fáa steyp og gullkrónur eftir 33. og síðsta umferð, og um teir røkka so langt, so verður talan um ein av mest óvæntaðu DM vinnarunum nakrantíð.

Sambært skránni skal Herfølge í síðsta umfarinum spæla á heimavølli. Mótstøðuliðið verður FCK, og tað vil við øðrum orðum siga, at tað er væl hugsandi, at Todi Jónsson verður á staðnum, tá Jákup Mikkelsen kann fara at fáa gullkrónuna.

Nú skulu vit ikki kanna Jákupi bitan, áðrenn hann er svølgdur. Tað ber eisini til at ímynda sær, at Todi fer at skora í tí dystinum og kanska harvið at syrgja fyri, at Herfølge ikki verður meistari, men nú mugu vit bíða eitt sindur við at ímynda okkum sovornar møguleikar.

– Tað hevur verið tosað nógv um Brøndby, og tað kann væl vera, at teir fara at vinna DM. Men møguleikin er eisini har, at tað fer at gangast hjá teimum, sum tað gekk hjá okkum í fjør. Brøndby og Herfølge hittast longu annað vikuskifti, og um Jákup og teir koma væl frá tí uppgávuni, so fara teir at liggja heilt væl fyri.

Hetta sigur Todi Jónsson, og hann heldur fram:

– Tað verður ofta sagt, at tað er skjótt at vinna seks stig innaftur. Men í útgangsstøðuni er Herfølge best fyri. Teir hava eitt gott fótbóltslið, og eg verði ikki ovfarin, um Jákup og teir vinna DM.

Hagtølini siga, at liðið, sum er fremst í vetrarsteðginum, endar á heiðursmerkjaplássi. Einasta undantakið í níti árunum er Brøndby, sum í vetrarsteðginum 1991/1992 var fremst, men sum endaði á áttanda plássi. Í fýra av sjey kappingarárum síðani tá, hevur oddaliðið í vetrarsteðginum vunnið DM.

Lítil knæskaði plágar

Todi Jónsson hevur hesar seinastu dagarnar drigist við ein lítlan knæskaða, men hann roknar við at vera klárur sunnudagin. Kappingin í FCK er stór um plássini, men sambært tí, sum FCK venjarin, Kim Brinck, sigur, so verður Todi í vinstru síðu á miðvøllinum, um hann ikki verður skaddur.

FCK spældi leygardagin síðsta venjingardystin undan kappingarbyrjan. Teir høvdu í Parkini vitjan av Malmö FF, sum varð sent um Oyrasund við 3–0 tapi. Todi Jónsson spældi í 75 minuttir, og sambært upplýsingum í donsku pressuni var tað serliga í vinstru síðu, at FCK myndaði vandamikil álop. Todi skoraði ikki, men ta einu ferðina var um reppið. Eftir solo gjøgnumbrot sendi hann langskot upp undir tvørtræið, men bólturin støkk niður skeivu megin málstrikuna.

Báðir í sjónvarpinum

Sunnudagin á middegi fer FCK til Aalborg við flúgvara. Dysturin móti meistaraliðnum úr AaB verður seinnapartin kl. 17, og hann verður vístur á sjónvarpsrásini TV3+. Síðsta løtan verður at síggja í Onside sendingini á TV3.

Jákup Mikkelsen og Herfølge fara ikki í eldin fyrr enn mánakvøldið. Tá skulu teir spæla í Lyngby. Tann dysturin verður sendur beinleiðis á TV3+ rásini.

John Faxe Jensen hevur ikki verið heilt nøgdur við spælið í venjingardystunum. Herfølge vann í fyrsta dystinum 2–1 móti Hvidovre, men sjálvt um teir spæla í Lyngby. Tann dysturin verður sendur beinleiðis á TV3+ rásini.



Todi Jónsson og liðfelagarnir skulu nú royna at stabilisera liðið

Í AGF skal Óli Johannesen verða við til at venda AGF skútuni, sum seinnu árini hevur havt kós niðureftir

hava havt bóltin mest í hinum dystunum, so hevur tað gingið illa at skapa málmøguleikar. Síðsta vikuskifti tapti Herfølge 1–0 móti grannunum á Køge.

– Men mínir spælarar eru kropsliga væl fyri, og konditiónin er í topp, sigur John Faxe Jensen, sum tykist ætla sær at spæla meiri við í vár, enn hann gjørdi í heyst. Venjarin segði undan kappingarbyrjan síðsta summar, at hann fór at verða nøgdur, um teir endaðu millum seks tey ovastu liðini, og Faxe sigur seg framvegis hava sama mál, og hann hevur einki ímóti, at trýstið verður lagt á gamla felagið hjá honum, Brøndby:

– Teir verða torførir at hava við at gera. Tá eini seks ella sjey umfør eru farin afturum, vera vit nógv klókari, enn vit eru nú. Um vit eisini tá fara at liggja væl fyri, so er ikki óhugsandi, at vit fara at miðja eftir einari hægri endastøðu, men í nakrar vikur afturat fara vit at miðja eftir sætta plássinum, er boðskapurin hjá John Faxe Jensen til øll tey, sum royna at flyta trýstið yvir á Herfølge.

Størri kapping í AGF

Hóast FCK ikki hevði nakað serliga gott heyst, so verður møguleikin ikki útihýstur, at FCK, sum er á áttanda plássi við 24 stigum, hevur møguleika at vinna tey fimm stigini, sum skulu til fyri at enda á heiðursmerkjaplássi.

Triðji føroyingurin í superliguni er Óli Johannesen. Í danska fótbóltsheiminum verður møguleikin ikki útihýstur, at stórfelagið í Århus fer at enda á øðrum niðurflytingar plássinum. Eftir átjan umfør er AGF triðji aftast við fimtan stigum. Hini liðini í kappingini fyri at sleppa undan niðurflyting eru Vejle 12 stig, Esbjerg 14 stig og OB, sum hevur 17 stig.

Óli Johannesen er við í stríðnum um plássini á liðnum í superliguni, og tað stríðið er ikki minni nú, enn tað var í heyst. AGF hevur keypt fýra spælarar í vetrarsteðginum. Anders Bjerre, sum bæði hevur verið í miðverjuni og á miðvøllinum, hevur verið knæskaddur, men hann venur aftur.

– Vit hava spælt væl í venjingardystunum, og tað vóni eg, at vit eisini fara at gera í landskappingini. Men mest týdningarmikið er, at vit fáa mál og vinna fleiri stig enn tey liðini, sum vit kappast við um at sleppa undan niðurflyting, sigur Peter Rudbæk, sum verður venjari í AGF fram til summarsteðgin.

JH